## Norskur málmur á Fjarðafestivalin

Norski progressivi málmsrokkbólkurin Extol er næsta navnið, ið verður kunngjørt á skránni fyri Fjarðafestivalin 2007. Extol hevur verið til síðan 1994 og verður sambært festivalinum mettur sum ein slóðbrótari innan kristnan rokk. Við sínum progressiva harða tungmálmsrokki hava teir sligið sítt navn fast í tungmálmumhvørvinum. Til ber at vitja Extol á heimasíðu teirra www.extolweb.com



# Dagtilhald á Oyri letur upp

**Hósdagin letur nýggja dagtilhaldið hjá teimum eldru í Sunda kommunu upp. Borgarstjórin Heðin Zachariassen fer at siga nøkur orð, Jógvan Fríðriksson kemur at halda fyrilestur og tónleikur verður eisini á skránni. – Vit skulu skapa karmarnar, og so mugu vit fylla teir í felag, sigur Brynjálv Borðoy, fyrireikari**

MENTAN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Oyri:** Seinastu dagarnar hava nøkur sjálvboðin fólk brúkt úti í gamla dagstovninum á Oyri, har tey hava gjørt klárt til, at niðara hæddin kann lata upp sum dagtilhald fyri tey eldru í kommununi.

– Vit ynskja at vita, um áhugi er fyri einum slíkum dagtilhaldi. Um so er, verður tað upp til kommununa at reka tað víðari, sigur Brynjálv Borðoy, ein av stigtakarunum til dagtilhaldið.

Brynjálv Borðoy sigur, at tey ynskja at skapa nakrar karmar fyri tey eldru í kommununi, og so mugu tey í felag royna at fylla teir. Uttan at vita tað við fullari vissu, so heldur Brynjálv Borðoy seg hava ábendingar um, at tørvur er á einum slíkum dagtilhaldið.

Hann sigur seg vóna, at fólk fara at taka væl í móti nýggja tilboðnum, og tí hava tey eisini roynt at gjørt eitt sindur burtur úr, tá dagtilhaldið letur upp alment hósdagin.

Tá kemur borgarstjórin í Sunda kommunu, Heðin Zachariassen, at siga nøkur orð. Jógvan Fríðriksson, prestur, fer somuleiðis at bera nøkur orð fram. Harnæst hava tey eisini fingið Sóljuband at spæla. Hetta er ein tónleikabólkur úr dagtilhaldinum í Klaksvík við fýra eldri fókum, og tey fara at spæla nakrar tónar til móttøkuna hósdagin kl. 14.



*Tey eldru fara at halda til í neðra í gamla barnagarðinum, meðan ovara hæddin er ætlað teimum ungu*

### Skipa fyri telduskeið

Hóast dagtilhaldið ikki letur upp fyrr enn hósdagin, hava stigtakararnir verið í gongd í eina tíð. Millum annað hava tey fingið eitt telduskeið upp á pláss.

– Hetta verður eitt heilt einfalt telduskeið, harmøguleiki er at læra at tendra og sløkkja eina teldu, og kanska eisini læra at lesa teldupost, sigur Brynálv Boroy, sum dømi um eitt tiltak, tey fara at skipa fyri í gamla barnagarðinum á Oyri.

# Sosialurin í heilagum bardaga

BILL JUSTINUSSEN



Oddagreinin 12. februar við yvirskriftini "Átrúnaður og politikkur" ger sama mistak, sum flestu onnur, ið hava viðgjørt Miðflokkin seinastu mánaðirnar. Roynt verður at samanbera okkara land, sum helst er heimsins friðarligasta, við Irak, Norðurírland og Balkan-lond. Tað er ivaleyst nyttuleyst hjá mær at greiða Sosialinum og øllum hinum frá muninum millum Irak og Føroyar. Er oddagreinsskrivarin á Sosialinum ikki vitandi um, at munur er á Irak og Føroyum, Guð viti, hvat hann so veit. Eftirhondini er støðuga júkanin um, at statsvaldið fyrr í tíðini tvingaði fólk til ávísa trúgv, sum førdi kúgan og trælkan við sær, og at hetta vil Miðfloksins politikkur aftur føra til, vorðin troyttandi og ikki sørt propagandakend. Fyri at siga tað stutt, so er Miðfloksins stevna júst tann øvuta av hesi ræðumynd, sum nøkur tíðindafólk trútta niður í føroyingar.

Miðfloksins aðalmál er júst at varðveita og útbyggja øll tey gagnligu framstig, sum kristni grundvøllurin gevur landi okkara. Tað er við blóði, sveitta og tárum at gleðiboðskapurin hevur vunnið fram í okkara parti av heiminum og hevur lyft samfeløg okkara frá armóð og trældómi til fremstu vælferðarsamfeløg í heiminum. Arbeiðararættindi, heilsutænastur, almenn forsorg, javnrættindi, mannarættindi, ídnaðarmenning og annað mangt eru alt úrslit av hesum sama boðskapi, og vil Miðflokkurin av øllum alvi stríðast fyri at halda hesum rættindum og hesi menning uppi og útbyggja tey. At kalla rákið í Føroyum fyri nýtt er sera primitivt, tí kristnir demokratiskir flokkar hava seinastu 50 árini verið ógvuliga sjónligir í flestu europeisku londunum. Og teirra mál hava verið tey somu sum Miðfloksins. Eg veit onki um, at Týskland, Italia, Holland og norðurlond hava kunnað samanborist við Irak og Norðurírland. Men tíverri hevur annað rák tikið seg upp í okkara grannalondum, sum nú er ein verulig hóttan móti positivu samfelagsgongdini. Hetta rák setir sjálvsøkni, persónligamenning og ómoral í hásæti við tí úrsliti, at kendu og óskrivaðu felags virðini spakuliga verða gloymd. Hvør einstakur avger síni egnu virði og setir síni egnu moralsku og etisku mørk. Tað, sum er skeivt fyri ein kann vera rætt fyri annan. Í fyrstu syftu tykist hesin hugsunnarháttur lokkandi - tí hava so mong tikið undir við honum -, men við tíðini verður hann eitt haft um beinini á samfelagnum og endar í ráða- og støðuloysi. Politikkur snýr seg ikki bert um at taka pening inn og luta hann rættvíst útaftur. Politikkur snýr seg um rættindi, um trygd og um børnini. At avgera, hvør tunnil skal byggjast fyrst, er barnamatur í mun til at taka avgerðir um, hvørji menniskjalig virði og mørk eiga at galda í einum samfelag. Tað er avbjóðingin, men fáir politikkarar hætta sær undir hana.

Oddagreinin í Sosialinum er primitiv, tí hon prógvar vantandi innlit og framskygni. Eg fari at biðja oddagreinsskrivaran um at leita sær upplýsingar um ein av mongum politikkarum í heimsflokki, sum júst orsakað av síni kristnu trúgv og við henni sum grundvølli og vegvísara aktivt ávirkaði bretskan politikk fyri stórt hundrað árum síðani, nevniliga William Wilberforce. Tað er alment kent og viðurkent, at hann framum aðrar var høvuðsorsøkin til, at trælahaldið og trælahandilin í Onglandi fekk ein enda tíðliga í seinastu øld. Og ávirkan hansara rakk so sanniliga eisini til Ameriku við sama úrsliti. Hann er bert ein av mongum, sum tíbetur ikki lurtaði eftir teimum, sum siga, at kristindómur og politikkur ikki hoyra saman. Tað var í øllum førum gott fyri kúgaðu fjøldina av svørtum trælum, sum at enda vórðu loystir úr fjøtrum.

Oddagreinin endar við at spyrja, hvønn rætt ávísir politikkarar og flokkar hava til at taka sær patent upp á kristindómin. Nú kenni eg ikki til hetta patent, men um so er, burdi tað verið tikið frá hesum politikkarum og flokkum beinanvegin, tí Kristus er givin øllum menniskjum til frelsu, og her er einkarrættur ógjørligur.

Kuriosum: Í Norður-Írlandi hevur ES í direktivi positivt staðfest, at arbeiðsgevarar hava loyvi at diskriminera vegna trúgv, tá fólk verða sett í størv, orsakað av serligu støðuni millum protestantar og katolikkar.

## Norrøna vendi aftur

Norrøna mátti venda aftur til Hanstholm leygardagin, tí eitt av ferðafólkunum kendi seg ikki væl.

Nakað eftir at Norrøna var farin úr Hanstholm leygardagin, fekk manningin boð um, at eitt av ferðafólkunum kendi seg ikki væl. Skiparin metti, at ferðafólkið var so mikið illa fyri, at viðkomandi átti at koma á sjúkrahús sum skjótast. Tí bleiv avgjørt at venda aftur til Hanstholm við sjúklinginum.

Hetta gjørdi, at Norrøna kom nakað seinni enn ætlað til Bergen, men skipið var kortini ikki seinkað til Føroya. Hinvegin fekk Norrøna ikki lagt at í Havn, tí vindurin var ov nógvur, og Norrøna fór tí til Klaksvíkar.